# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri
Brend
snorri@sosialurin.fo



Jens Kristian
Vang
jensk@sosialurin.fo

Oyggjablaðið næsta mikudag:
Vestanstevna í Sørvági

# Gleða seg

**Nú nærkast av álvara til ársins fimtu stevnu – Fjarðastevnuna í Vestmanna. Henda stevna hevur nógv ár á baki, og spurningurin er enn einaferð, um hon hevur sama áhuga millum vestmenningar í dag sum áður. Tann spurningin settu vit okkum at kanna. Inni í tveimum handlum í Vestmanna hittu vit nøkur av viðskiftafólkum teirra. Spurningurin til teirra var hesin: *Ert tú spentur til Fjarðastevnuna í ár?***



*– Jú, eg eri spentur. Mær dámar væl stevnurnar, serliga kappróðurin.*
**Mouldi Bourbian, Vestmanna**



*– Nei, eg eri ikki serliga spent. Tað er einki serligt við stevnunum longur. Men kappróðurin, hann er OK.*
**Katrin Andreassen, Vestmanna**



*– Eg havi ikki sæð skránna. Men eg gleði meg til alt sum er, serliga kappróðurin.*
**Ejfinn Joensen, Vestmanna**



*– Jú, eg eri spentur. Vit plaga at hugna okkum, bæði á sjógvi og á landi. Eg eri ikki serliga spentur í kappróðri.*
**Páll Poulsen, Vestmanna**



*– Veit ikki hvat eg skal siga. Eg havi upplivað tær so ofta, og tær eru nøkulunda tað sama ár eftir ár.*
**Karl Simonsen, Vestmanna**

# Eingin ósemja á plenuni

Millum ár og dag hava mong mál av felags áhuga verið uppi og vent í samstarvinum millum báðar grannakommunurnar – Vestmanna og Kvívík.

Sum vera man eru bygdaráðslimirnir ójavnir á máli um teir ymisku spurningarnar. Men á Fjarðastevnuni sleppa tey í øllum førum at gloyma alt um ósemjur og politisk mál.

Sunnudagin kl. 15 verður nevniliga ein fótbóltsdystur leiktur millum umboð fyri Vestmanna kommunu og Kvívíkar kommunu. Her ræður bara um at fáa bóltin í mál hjá mótstøðuliðnum.

Dysturin, sum er settur at vara í ein tíma, verður spældur á plenuni í skúlanum.

# Borgarstjórin setir stevnuna

Sum við øllum øðrum stevnum skal stevnan setast. Hetta fer borgarstjórin, Karl A. Olsen at taka sær av.

Henda setanin verður á bryggjuni, beint við undirhúsið, og síðani verður farið beinleiðis í holt við barnaróðurin.

Tá hesir eru at enda komnir, og allir hinir vinnararnir funnir, fer Bárður Nielsen at handa steypini á sama staði.

# Skúlin er grønasti stovnurin

Í farni viku varð kunngjørt, at virðislønin fyri Ársins grøna stovn verður latin skúlanum í Vestmanna, sum hevur gjørt nógv fyri umhvørvið.

Í metingini verður sagt, at í skúlanum hevur ein rokkið fleiri málum at minka um orkunýtslu til bæði upphiting og ravmagn. Skúlin hevur eisini fingið í lag vælvirkandi ruskskiljing har pappír, matleivdir, battarí'ir og annað rusk verður tikið inn til hagreiðing.

– Nakað fer til beinleiðis endurnýtslu, annað er vandamikið rusk, meðan matleivdir fara til kompost, har tøðini verða nýtt í viðarlundini og aðrari gróðurseting, ið skapt er kring stovnin farnu 10 árini, verður sagt.

Skráir og ætlanir eru lagdar, har myndugleikar, starvsfólk og brúkarar í felag skipa grønu verkætlanina, ið støðugt er í menning og útbygging. Við framskygni og við áhaldandi at menna grøn tiltøk, er hesin stovnur fyrimyndarligur og eitt gott dømi um, hvussu slíkir stovnar kunnu skipast.

– Metingarnevndin hevur ongar neiligar viðmerking til henda stovnin, verður sagt at enda.